Altjóða oljublað um føroysku-bretsku marknatrætuna:

Partarnir so langt frá hvørjum øðrum sum ongantíð áður

-Men partarnir eru stutt frá eini endaligari avgerð um, antin at taka víðgongd stig móti eini loysn ella at semjast um, at ein er ósamdur, og tí má okkurt heilt annað gerast enn vanligar samráðingar.

JAN MÜLLER

Sum flestum kunnugt endaðu seinastu marknasamráðingarnar í London uttan nakað úrslit. Tað vóru annars føroyingarnir, sum skuldu leggja fram eitt nýtt útspæl, nú bretar høvdu lagt sítt fram á fundinum í Keypmannahavn í summar. Tá ljóðaði, at bretar høvdu slakað í ávísan mun og vóru fúsir at tosa út frá princippinum um eina ella aðra miðlinju sum mark.

Tað hevur verið torført at fáa annað at vita frá føroyskari síðu eftir samráðingarnar, at har hendi einki framstig og at fundur heldur ikki varð avtalaður, sum annað ætlað. Hann skuldi vera í Havn í november. Men eftir samráðingarnar varð avgjørt, at teir báðir formenninir skulu tosa saman aftur og avtala nýggjan fund.

Sosialurin hevur skilt støðuna soleiðis, at føroyska samráðingarnevndin fekk greið boð frá løgmanni, áðrenn hon fór til London, ikki at slaka stórvegis men at standa fast við sítt upprunaliga sjónarmið.

Henda støða føroyinga skal so hava skapt nakað av naggatóðn í samráðingunum og helst eisini bilsni millum bretsku samráðingarfólkini, sum kundu hava ilt við at siggja nakra meining í at fara aftur til sítt bakland, tá føroyingar ikki høvdu nakað nýtt útspæl yvirhøvur.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa hetta váttað, tí báðir partar hava tagnarskyldu. Í einum úttalilsi eftir fundin í London stendur tó, at báðir partar fara at hava samband hvør við annan um møguleikarnar fyri nýggjum fundum.

Hyggja vit í útlendska oljublaðið „Upstream", so hava partarnir ongantíð staðið so langt frá hvørjum øðrum sum eftir samráðingarnar í London.

Dan Rigden, sum er blaðmaður hjá blaðnum í London, skrivar, at tað tykist alt meira sannlíkt, at um ikki annar av pørtunum fullkomiliga broytir støðu sína, endar alt málið við altjóða dómstólin í Haag.

Eitt sakarmál fer so at taka fleiri ár. Kortini tykjast báðir partar at vilja royna aftur á einum nýggjum fundi, sum skal vera áðrenn hetta árið er úti.

Føroyingar og bretar eru annars samdir um at hava eina avklárlng í málinum áðrenn januar komandi.

Ein eygleiðari sigur við Upstream, at fundurin í London vísti, at báðir partar eru sera nær eini avgerð, sum antin er at fremja eina samráðingarloysn ella at semjast um, at ein er ósamdur.

Faeroes and UK against the clock

lamour grows
r end to the
white zone'
stalemate

DAN RIGDEN
from London

Change at the top: Faeroese hope the new Labour government under Tony Blair, pictured at the party conference this week, might be in giving mood over competing claims.

Greinin í altjóða oljublaðnum „Upstream" við mynd av bretska forsætisráðharranum, sum kann loysa marknatrætuna millum Føroyar og Bretland

Trýst frá oljuvinnu

Blaðið vísir annars á, at størri trýst verður lagt á partarnar at finna eina loysn, nú oljufeløgini siggja stórar møguleikar fyri olju í Hvíta økinum. Hetta umstridda økið goymir helst nógva olju og gass, og tí ynskja oljufeløgini eisini at sleppa at leita.

Blaðið skrivar annars, at meðan føroyingar ynskja eina miðlinju sum mark, sum í dag er fiskivinnumark og sum varð skotið upp av bretum á sínni, so ynskja bretar, at markið verður nærri Føroyum enn upprunaliga uppskotið um fiskimark. Tað verður mett, at føroyingar kunnu góðtaka eitt undirgrundarmark, sum liggur onkunstaðni millum tey bæði fiskimarkskrøvini, men at bretar vilja hava nógv meira.

Umboð fyri eitt stórt oljufelag, sum vil vera við í leitingini eftir olju við Føroyar sigur við Upstream, at tað er eitt stórt ynski, at henda træta verður loyst. -Vit eru fangað í miðjuni, hóast vit væl duga at skilja, hvussu torført málið er at loysa.

Umboð fyri eitt annað felag sigur við blaðið, at tey rokna við, at málið verður loyst, men tíðarspurningurin hevur nógv at siga. Ein ber ótta fyri tíðini, sum ein sak fer at taka.

-Eg haldi, at ídnaðurin hevur roknað við, at ein broyting fór at koma við nýggju stjórnini. Vit eru eisini bjartskygdir um , at Labour fer at vera meira sinnað at finna eina loysn enn undanfarna stjórnin sigur kanningarstjóri hjá oljufelag við blaðið.

Hann vísir á, at tað í hesum máli er eitt politiskt presendens at vísa á, tí bretsku myndugleikarnir skutu í 1977 upp fyri føroyingum at miðlinjan skuldi vera fiskimark. Tá var tað Labour, sum sat við roðrið.

Ein føroysk kelda sigur við blaðið, at ein Labourstjórn hevur einki at missa við at góðtaka eina miðlinju, tí hetta er í samsvar við upprunaliga politikkin hjá Labour, og hetta er so eisini í andsøgn til tey heldur víðgongdu krøv, sum konservativa stjórnin setti fram í 91.

Millum limirnar í Vinnulívsnevndini, sum fara til Noregs er eisini javnaðartingmaðurin Henrik Old.

Løgtingsins vinnunevnd:

Til Noregs at kunna seg við oljuvinnu

JAN MÜLLER

Vinnunevndin hjá løgtinginum fer í næstum á vitjan í Noregi, har hon skal kunna seg við oljuvinnu. Hetta verður ein tann fyrsta vitjanin, sum føroyskir løgtingsmenn gera í útlandinum síðani áhugin fyri Føroyum sum eitt komandi oljuøki tók seg upp fyri nøkrum árum síðani. Tað vit vita um, at føroyskir politikarar fyrr hava verið á vitjan í útlandinum at kunna seg við hesa vinnu, var m.a. í 1991, tá eitt ferðalag úr Føroyum við m.a. tveimum landsstýrismonnum á odda, vitjaði altjóða oljumessuna í Aberdeen. Síðani tá hava eisini einstakir politikarar verið við á vitjanum til útgerðarhavnir o.l. saman við vinnulívsfólki og kommunalum umboðum. Men hetta er so fyrstu ferð, at ein heil nevnd úr løgtinginum fer avstað.

Sambært tíðindum í Útvarpi Føroya nú um dagarnar skal vinnunevndin vitja bæði oljulyrisiting og ymisk pláss í Noregi, har oljuvinnan er partur av gerandisdegnum. Her verður m.a. hugsað um útgerðarstøðir og oljuhavnir.

Formaðurin í Vinnunevndini, Jørgen Niclasen segði við útvarpið nú um dagarnar, at nevndin hevur áhuga í at vita, hvussu oljan ávirkar samfelagið, hvussu lóggávan er og hvussu lóggávubýtið er. Og ikki minst vil Vinnunevndin hava at vita, hvørji mistøk Noreg hevur gjørt á oljuøkinum.

Ætlanin var at Edmund Joensen, løgmaður skuldi fara á vitjan í Noregi herfyri. Men ferðin varð avlýst orsakað av mjørka í Vágum



Jørgen Niclassen, formaður í Vinnulívsnevndini, sum nú fer til Noregs at kanna oljuvinnu, áðrennn tingið fer at viðgera eina komandi oljulóggávu